TAKS

## TOLLUR – tað er ikki bara sum at siga tað!

# POSTTOLLURIN LEITAR EFTIR FÓLKI

**Vit leita** eftir fólki, sum tekur við ábyrgd á sínum arbeiðsøki, hevur góð samstarvsevnir, skapar úrslit og gert sítt til at skapa arbeiðsgleði og fegin vil veita viðskiftafólkunum góða og vegleiðandi tænastu, tað verði seg um telefon ella disk.

**Vit eru** ein stovnur í støðugari menning og virða meiningar og fjølbroytni hvør hjá øðrum. Virðini og mentanin eru m. a. grundarlagið undir virkseminum á stovninum. Hvørs endamál er í samsvar við misjónina, at:

*trygga landskassanum skatta- og avgjaldsinntøkur. Eyðkenni okkara skal vera góð tænasta.*

**Vit ímynda** okkum at tú hevur HH, skrivstovuútbúgving e.l. og ert í holt við framhaldandi útbúgving ella, at tú longu hevur aðra útbúgving - møguliga innan roknskap ella líknandi. Harumframt vænta vit, at tú ert framsíggin og at tú tillagar teg saman við stovninum til tær avbjóðingar, ið liggja fyri framman. Hetta kann viðføra broyting í starvsinnihaldinum.

**Høvuðsuppgávan** verður eftirlitsarbeiði, samskifti um tollspurningar, tollavgreiðsla (virkir og kundar), telduviðgerð og eftirkanning av tollingaráheitanum.

**Vit bjóða** eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt arbeiði, har hvør dagur er opin fyri fakligum avbjóðingum. Eisini kunnu vit bjóða fleksarbeiðstíðir.

**Setanarøki** í løtuni er TAKS á Óðinshædd. Starvið fevnir annars um allar stovnar undir Fíggjarmálaráðnum.

**Starvið** verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag og er treytað av starvsroyndum, starvsinnihaldi og útbúgving.

**Áhugað**, ið vilja vita meira um starvið kunna venda sær til Eyðun Mørkøre, stjóra hjá TAKS á Hálsi, á tlf. 562799.

**Umsókn** saman við avriti av prógvum og ummælum skal verða TAKS í hendi í seinasta lagi 25. juli 2008, kl. 12.00. Viðmerk: Umsókn »posttollurin«.

**TAKS**
**Postboks 2151**
**FO-160 Argir**
**ella til taks@taks.fo**

stílað: Eyðun Mørkøre, stjóra

*»Vit vísa vælvild og lurta, tá viðskiftafólk tørva hjálp«*

TAKS er ein stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjalsskattalógina og innheintingar innan málsøkini hjá stovninum.
TAKS hevur 135 starvsfólk og er skipað við einari høvuðseind á Argjum og trimum skrivstovueindum runt landið.




Gingið verður av oyggjarvegnum til Leynar.

Leiðin liggur framvið Skælingsvatni, har Nykurin helt til.

Vit njóta friðin í vøkru náttúruni ímillum Sátuna og Skælingsfjall.

Fyri sunnan liggur Koltur, fyri vestan Vágaland. Eitt satt fragd fyri eyga!

Um tilber vitja vit træskera.

Aftaná eina lætta máltíð á úticafé í Leynum, verður koyrt aftur til Tórshavn.

Túrurin er sera lætt gongdur.

Farið verður úr Tórshavn leygar- og sunnudagar kl. 14:00.
Sjálvandi eru tær báðar Lama og Alpacha við á túrinum.

Tilmelding á **tlf. 28 54 55** í seinasta lagi dagin fyri.

Aðrar tíðir kunnu avtalast.

**Visti tú ikki tað? Sosialurin**



## Starv á Hagstovuni

Vit sóknast eftir einum dugnaligum fólki til íbúgvahagtøl og arbeiðsmarknaðarhagtøl.

Arbeiðið umfatar bæði rakstur av verandi hagtalsskrá og menning av nýggjum hagtølum um evnini. Nýggju verkætlanirnar fara fram í samstarvi við KT deildina á stovninum.
Tú verður partur av einum stovni, sum hevur informasjón til høvuðsstarv, og tú fært høvi at hava alt verkið um hendi - heilt frá tanka til útgávu.

### Førleikar

Talan er um fulltíðarstarv, sum krevur analytiskar førleikar, akademiska ella tilsvarandi útbúgving og gott KT skil.
Vit seta tær onga formliga treyt um serliga útbúgving, men gera kortini vart við, at vit hava tørv á væl lærdum og dugnaligum fólki.

- Akademisk útbúgving í hagfrøði ella samfelagsfrøði er ein fyrimunur.
- Góð evni til KT er eisini fyrimunur.

Vit rokna við, at rímiliga rúm tíð fer til at læra stovnin og arbeiðslagið at kenna, at læra um hagtøl og um nýggju uppgávurnar. Tað vit bjóða tær, er eitt áhugavert starv, í samstarvi við dugnaligar og væl vitandi starvsfelagar.

### Umsókn

Lønin er sambært galdandi sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi fakfelag.
**Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. august** og kann bæði sendast sum teldupostur og vanligt postbræv.

Vilt tú hava meira at vita um størvini og møguleikarnar, ring so á Hagstovuna – 352800 – og bið um at tosa við Jógvan Bærentsen (fartel.: 581878) ella Hermann Oskarsson (fartel.: 225038).

SENDISTOVAN

HAGSTOVA FØROYA
KVÍGGJARTÚN 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX + 298 35 28 01 · HAGSTOVAN@HAGSTOVAN.FO · WWW.HAGSTOVAN.FO